# Samanhald og samhaldsfesti eru besta vápnið

**Norðurlendskt samanhald og innanlands samhaldsfesti, har tey sterkastu lyfta tyngstu byrðarnar. Hesi saman við almennum íløgum í byggivirksemi og viðlíkahaldi av almennum bygningum, eru bestu vápnini móti áleikandi fíggjarkreppuni. Tað vóru norðurlendsku Javnaðarflokkarnir samdir um á fundi í Helsinki í farnu viku**

*Tíðindaskriv*

Í farnu viku vóru John Johannessen, form. Javnaðarfloksins á tingi, og Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna og fíggjarnevndarlimur, á fundi í Finnlandi saman við umboðum fyri hinar norðurlendsku Javnaðarflokkarnar.

Nógv tíð varð brúkt upp á avbjóðingarnar, ið fíggjarkreppan hevur við sær, og leiklutin hjá Javnaðarrørsluni at syrgja fyri, at fólk ikki koma illa fyri orsakað av kreppuni.

Samfelagið stendur fyri broytingum. Og skulu vit venda gongdini, soleiðis at talan verður um broytingar, sum í síðsta enda hava eitt betri samfelag við sær, er neyðugt at tryggja, at øll hava møguleika at luttaka í samfelagnum. Avbjóðingin er at skapa tryggleika. Tí tað eru bert trygg menniskju, ið vilja broytingar og sum eru før fyri at tillaga samfelagið.



*Fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin, Thorvald Stoltenberg, sum er pápi núverandi norska forsætisráðharran, var serstakliga áhugaður í føroyskum viðurskiftum og hvussu Javnaðarflokkurin í Føroyum arbeiðir. Her sæst hann saman við Eyðgunn Samuelsen og John Johannessen*

Grundarlagið undir øllum tillagingum má vera eitt samhaldsfast samfelag, har øll eru við til at lyfta í felag, og har tey sterkastu lyfta tyngstu byrðarnar. Byggja vit ikki á hendan grundvøllin, kann fíggjarkreppan uttan iva fáa álvarsligar avleiðingar fyri samfelagið.

Politiska skipanin og sjálvsagt serliga Javnaðarflokkarnir hava ábyrgdina av at stinga hendan leistin út í kortið. Tað gerst millum annað við økja um leiklutin hjá tí almenna, soleiðis at landið byrgir upp fyri sveiggjunum í marknaðinum og óhepnu avleiðingunum av tí grískna og púra óstýrda neoliberalistiska marknaðinum, vit hava sæð seinastu árini. Eisini má byrgjast upp fyri arbeiðsloysi við at seta í gongd skilagott alment byggivirksemi, sum t.d. bygging av skúlum og eisini at umvæla og bjálva almennar bygningar.

Og júst tær 15 mió., sum samgongan í Føroyum hevur sett av til bjálving av almennum bygningum, er ein skilagóð og gongd leið á hesum øki. Tí saman við fíggjarkreppuni hava vit eina veðurlagskreppu, ið vit eisini skulu byrgja upp fyri. Tí er skilagott, at tær íløgur, ið gjørdar vera, eru rættaðar ímóti at gera samfelagið minni bundið at oljuídnaðinum.

Javnaðarflokkarnir eru samdir um, at tað er tann sterki staturin við øktum samhaldsfesti og íløgum, ið tryggja framtíðina, sum er førur fyri at vinna á fíggjarkreppuni.

# Funnið – Horvið

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ

Hevur tú mist eitt djór ella funnið eitt, ring til okkum, kanska kunnu vit hjálpa. Hetta er lýsing hjá Djóraverndarfelagnum.

Ætlanin við einari tílíkari lýsing er at vera millumlið millum djór og eigara, soleiðis at eigarin fær sítt djór aftur, og djórið fær sín eigara aftur.

Djóraverndarfelagið skal hjálpa djórum í neyð, og hvat er meira neyðarsligt enn eitt heimleyst djór?

Enn vita øll ikki, at tað kann loysa seg, at boða okkum frá, um tey hava mist eitt djór ella funnið eitt. Men ímynda tykkum tað stóru gleði, tá tað er samsvar ímillum hesi bæði horvnu og funnu djórini? Tað hendir faktisk rættiliga ofta. Men eisini ofta ikki. Summi djór eru sporleyst forsvunnin, og onnur verða funnin uttan at nakar spyr eftir teimum, og tá royna vit at finna nýtt heim.

Onkuntíð spyrja fólk eftir djórinum hjá sær, ganga ør og leita, samstundis sum onkur annar ringir og sigur: “Tú, her gongur ein hundur, hann sær ikki út til at vita, hvat hann skal, hann gekk eisini her ímorgun.” “Hav hann hjá tær, fólk leita eftir honum, tey eru á veg.”

Seinasta sólskinssøgan var um 17 ára gomlu, deyvu Barbie, ið var sloppin út, tí portrið stóð opið, hon var burtur í eina nátt. Hon var endað úti á Statoil á Viðarnesi, har oljubilarnir fylla tangan. Til alla lukku møtti hon tveimum fittum monnum, ið undraðust á, hví her gekk ein hundur einsamallur og mól. Teir vistu, hvar teir skuldu ringja, nevniliga Djóraverndarfelagið, tlf. 504533.

Nú skuldi ikki verið neyðugt at biðið fólk um ALTÍÐ at lata hundin hava hálsbandið á. Navnaskelti fæst m.a. hjá Valdemar Lutzen, kostar ikki eina formúu.

Øll djór eiga at vera merkt, antin chipsmerkt ella hava hálsband við navnið. Tað er tann lættasti mátin at fáa djórið heimaftur. Fyri ikki at siga einasti mátin, um tey enda hjá løgregluni.

Vit takka øllum hjartagóðum djóravinum, ið tíma at taka sær av burturkomnum djórum.

# Viðv. fríviku við ongari løn

Á fundi í dag hava Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Starvsmannafelagið, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Akademikarafelag Føroya og Føroya Lærarafelag viðgjørt spurningin um fríviku við ongari løn.

Talan er í veruleikanum um lønarniðurskurð. Fakfeløgini hava stríðst fyri at vinna limum sínum betri lønarsømdir, og tøl prógva, at reallønin er fallin seinnu árini. Tí eru fakfeløgini prinsipielt ímóti hesi loysn.

Fakfeløgini staðfesta, at eingin almennur myndugleiki hevur vent sær til okkara um hesi viðurskifti, hóast tað eru fakfeløgini vegna limir sínar, sum hava sáttmálar við almenna arbeiðsgevaran. Fakfeløgini eiga tí alla ábyrgd og allan avgerðarrætt á økinum vegna limirnar.

Fakfeløgini hava sáttmálar við Fíggjarmálaráðið, og mál sum hesi skulu verða viðgjørd millum partarnar; og ikki millum leiðslu og einstaka starvsfólkið.

Hóast møguligar avleiðingar fyri tann einstaka, skulu fakfeløgini ikki taka á seg ábyrgdina av førda politikkinum hjá landsstýrinum og Løgtinginum.

*Vinaliga*
**- Føroya Pedagogfelag**

**- Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**
**- Felagið Føroyskir Sjukrarøktarfrøðingar**
**- Akademikarafelag Føroya**
**- Starvsmannafelagið**
**- Føroya Lærarafelag**

# Ein takkarkvøða til »VB-vinir

ROBERT MCBIRNI



Tað vardi meg ikki, tá ið eg varð biðin um at møta í Stóra pakkhúsi leygarmorgunin tann 10. januar klokkan 10, at slíkt skuldi verða mær fyri.

Hvør skuldi trúð, at her, sum eg sum óviti hjálpti Kalinum við Misá at trilla mjøl - og sukursekkir oman eftir sliskuni frá Stóra pakkhúsi og niðan í Garða-krambúð, og her sum eg, saman við javnaldrum tey køldu myrku vetrarkvøldini funnu leiðina gjøgnum tær brøttu trappurnar upp á seglloftið, har Kristin á Økrum og Julius Holm sótu framman fyri tað glóðheitu kabyssuna og seymaðu segl, samstundis sum teir vóru dómarar, tá ið vit tóku brókatøk úti á tí stóra seglinum? - Ja hvør skuldi trúð, at eg, meir enn 50 ár seinni, skuldi verða heiðraður við morgunmati, kórsangi, talum og gávum. Har ímillum ein stóran málning av mær sjálvum.

Ei undur í, at eg ikki fekk takkað tykkum nóg nógv, tí hetta takkarskriv.

***Eg takki her øllum av heilum hjarta***
Og ynski mítt verða skal her
At Vágsbygd má fáa tað framtíð so bjarta
Sum ungdómin heimaftur ber
At vinna og mentan ja ítróttar-mál
Skal blóma í komandi ár
Eg ivist als ikki men sigi sum Pál:
“Hetta er heimbygdin vár!”

# Koppseting ímóti lívmóðurhálskrabba

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Tað er ótrúligt at lesa, hvussu Tjóðveldi hevur æruna av øllum góðum samtyktum á løgtingi, nú tey sita í andstøðu. Alt ið verður samtykt á tingi, ið ber á jaliga bógvin, ja tað hevur Tjóðveldi, so ella so, æruna av. Men er okkurt mál, ið teimum ikki dámar, ja so hava øll hini skuldina. Besta dømið er fíggjarlógin fyri 2009, ið Tjóðveldi, alt sum tað var, atkvøddi fyri. Tað er teimum at takka fyri, tey jaligu málini, ið vóru samtykt, og restina av fíggjarlógini hava øll hini ábyrgdina av.

Viðvíkjandi koppseting móti lívmóðurhálskrabba, so legði Tjóðveldi uppskot til samtyktar hesum viðvíkjandi fyri tingið. Veruleikin er bara tann, at eitt uppskot til samtyktar viðførir onga játtan av sær sjálvum, heldur ikki um tingið samtykkir uppskoti. Undir 1. viðgerð av uppskotinum um koppseting ímóti lívmóðurhálskrabba, meldaðu allir samgonguflokkarnir út, at peningur skuldi setast av til hetta í 2009.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini í fíggjarnevndini var tí avrátt at seta neyðuga peningin av. At upphæddin, ið var avsett er 1 mió, kemur av tí einfaldu orsøk, at á kontuni koppsetingar, har hesin peningur verður játtaður, var ikki øll upphæddin fyri 2008 nýtt, har sá út til at verða eitt avlop. Tí metti fíggjarnevndin, eisini Tjóðveldi, at 1 mió fór at verða nokk til endamáli í 2009 og tí var tað henda upphædd, ið var avsett.

At Tjóðveldi nú førir fram, at tað resta 400 t.kr í til koppsetingina og dyrgja eftir, at tingið vísir vilja til at finna írestandi peningin, er onki minni enn partapolitikkur tá ið hann er best.